## Heimarøktin øki 5 – Suðuroy

**Almanna- og Heilsumálastýrið hevur avgjørt at seta í verk eina royndarskipan við koyrandi náttarvakt í Suðuroy.**

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum, at arbeiða í skiftandi vaktum, skjótast gjørligt.
Ábyrgdarøki er heimabúgvandi fólk og tey ið búgva á eldrasambýlunum í oynni.

**Vit sóknast eftir røktarstarvsfólki sum við røktarfakligum royndum**
- hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt við ábyrgd
- er før/ur fyri at loysa bráfengis uppgávur
- hevur góð samstarvsevni
- er før/ur fyri at arbeiða undir skiftandi umstøðum
- hevur koyrikort til persónbil

**Vit bjóða:**
- eitt starv við møguleika at menna starvs innihaldi
- eitt spennandi arbeiðspláss við nógvum røktarfakligum uppgávum
- eitt gott arbeiðsumhvørvi

Starvið er tíðaravmarkað til 31. desember 2006 tá skipanin verður eftirmett.

**Lønar og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambart sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Felagið Føroyskir Sjúkra-røktarfrøðingar

**Umsóknarfeist** 7. juli 2006

### Fast Starv
## Heilsurøktari

Søkt verður eftir heilsurøktara frá 1. septermber 2006, at arbeiða 32 tímar um vikuna í skiftandi vaktum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Almanna- og Heilsurøktar-felagið.

**Umsóknarfreist:** 1. august 2006

Um tú ynskir at vita meir um størvini, ert tú vælkom-in at ringja til: økisskrivstovuna, tlf. 373907

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Heimarøktin, øki 5**
900 Vágur

# Ung í Arbeiði til Vágs kommunu

Ung fólk sum ynskja sær okkurt at gera í summarfrítíðini eru vælkomin at venda sær til Vágs kommunu, sum í summar skal gera ymiskt fyrifallandi arbeiðið á Tekniska Økinum.

Um hetta hevur tín áhuga eru tit vælkomin at seta tygum í samband við umsitingina hjá Vágs kommunu tlf. 373024 áðrenn 3. juli 2006 kl. 12.00

**Vágs kommuna**
Vágsvegur 22
Fo-900 Vágur

### Kunngerðir í samband við ferðslu á jóansøku:

# Frá Vágs kommunu

Meðan kappróður fer fram leygardagin kl. 13.00 – 18.00, er øll óviðkomandi sigling á og við kappróðrarøki bannað.

Í tíðarskeiðinum frá fríggjakvøldið kl. 18.00 til sunnukvøldið kl. 23.00, er ferðsla bert loyvd á havnaøkinum í samband við fráferð og komu hjá Smyrli. Ikki verður loyvt at parkera á økinum. Víst verður til almennu parkeringsplássini.

Meðan skrúðgonga fer fram á vegastrekkinum frá gamla skúla og út til Minnisvarðan, leygardagin kl. 13.00 – 14.30, verður heitt á bilførarar um ikki at koyra eftir nevnda vegastrekkið.

Í samband við Jóansøkufestivalin á Vágseiði, verður vegastrekkið frá Páll Bjarkhamar og vestur á Vágseiði stongt fyri ferðslu, fríggjadagin og leygardagin, báðar dagarnir frá kl. 16.30 til 01.00.

Eisini verður vegastrekkið frá Hans Paula Dahl og vestur til rættina á Fjallinum, stongt fyri ferðslu, sama tíðarskeið.

**Vágs kommuna**

# Tilboð upp á skúlabarnaflutning

Fuglafjarðar kommuna lýsir hervið skúlabarna-koyringina Hellurnar-Oyndarfjørð skúlaárið 2006-2007 leysa frá 14. august 2006 at rokna.

Talan er um flutning av einum næmingi av Hellunum til skúlan í Oyndarfirði og flutningur aftur til Hellurnar eftir skúlatíð.

Tað verður kravt, at tann ella tey, ið átaka sær skúlabarnakoyringina lúka krøv um, at akfarið, ið nýtt verður, skal verða góðkent og skrásett til vinnuligan fólkaflutning, herundir tryggjað til vinnuligan fólkaflutning, og at førarin hevur galdandi koyrikort til vinnuligan fólkaflutning til persónbil ávikavist buss.

Møgulig tilboð, ið skulu verða skrivlig, skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 14. juli 2006 kl. 15.00.

Nærri upplýsningar um flutningsdagar og tíðir kunnu fáast frá Halli Ellingsgaard, skúlaleiðara við Oyndarfjarðar skúla á telefon 252264.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomin tilboð ella einki at taka.

Fuglafjørður, tann 20. juni 2005

**Fuglafjarðar kommuna**

### Ognir í Vestmanna til sølu

Um hóskandi boð fæst verða hesar ognir í Vestmanna seldar:

Matr. nr. 266g, ið er eitt neystagrundstykki miðskeiðis við sjálvan bátahylin til støddar 54m² (herav 14 m² vegur), og er at kalla byggibúgvið. Vegleiðandi prísur er ásettur til 150.000 kr.

Matr. nr. 2a, ið er bøur innangarðs Úti í Gerðinum við vegin Út á Berg. Ognin er 2.300 m² til støddar og liggur í landbúnaðarøki, men tó nærhendis sethú-sum.

Áhugaðir keyparar kunnu venda sær til

FAROE LAW
Tróndargøtu 19 · Postboks 158 · 110 Tórshavn
Tlf 359900, 219902 ella t-post: eyj@faroe-law.fo


# Nýggjar TANNPROTESUR
**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við